## Drap fýra løgreglumenn

Løgreglan í amerikanska statinum Washington leitar eftir einum 49 ára gomlum manni, sum myrdi fýra løgreglufólk á einari kaffistovu í gjárkvøldið. Løgreglan sigur, at tey fýra løgreglufólkini, tríggir menn og ein kvinna, vóru farin inn á kaffgistovuna á veg til arbeiðis. Tey varnaðust, at tann 49 ára gamli hevði eina byrsu undir jakkanum, men áðrenn tey fingu umrøtt seg, tók hann byrsuna fram og skeyt tey fýra. Løgreglan sigur, at talan var um tilætlað dráp. Drápsmaðurin er fyrr dømdur fyri rán og neyðtøku, men fekk grið fyri nøkrum árum síðani, skrivar AP.



## Berlusconi verjir mafiuna

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, er enn eina ferð umrøðuevni í altjóða fjølmiðlunum. Hesaferð skriva miðlarnir um eina røðu, sum Berlusconi helt á einum fundi hjá flokki sínum Forza Italia leygardagin. Har segði hann, at hann kundi hugsað sær at kvalt tey, sum hava skrivað bøkur um mafiuna, tí tey hava givið Italia eitt vánaligt umdømi í umheiminum. Reuters skrivar, at kanningar hjá italsku løgregluni benda á, at Berlusconi hevði sjálvur samband við fleiri bumbuatsóknir í Italia í 1992 og 1993.

# Størsta framsýningin nakrantíð



**Sum siður er, so hevði Føroya Heimavirkisfelag søluframsýning um vikuskiftið. Hesaferð var framsýningin størri enn nakrantíð áður við umleið 150 framsýnarum í Høllini á Hálsi**

FRAMSÝNING
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Mest bundið, men eisini málningar og annað ítrív varð víst fram í Høllini á Hálsi í vikuskiftinum.

Talið av vitjandi var eitt sindur lakari í ár enn undanfarin ár.

- Umleið 1000 fólk komu á gátt, sigur Maiken Hammer, formaður í Føroya Heimavirkisfelag.

Sølan hjá framsýnarunum gekk hampuliga, men Maiken sigur, at tað merkist at fólk ikki hava líka nógvan pening um hendi sum áður.

Søluframsýningin hevur yvir 15 ár á baki og er vaksin fyri hvørt ár.

*Málningar, jólanissur og bundin pløgg vórðu víst fram um vikuskiftið í Høllini á Hálsi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





# Jólahugni í Viðarlundini

**Nógv børn og vaksin høvdu spákað sær ein túr oman í Viðarlundina í Havn sunnudagin. Lions Club Tórshavn skipaði fyri sínum árliga jólahugna**

JÓLAHUGNI
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*





Ljósini bleiktraðu í vakra vetrarveðrinum. Bál brunnu á fleiri støðum og Havnar Hornorkesturspældijólatónleik. Eisini var gjørligt at keypa okkurt til matna, og grann at pynta við heima við hús.

Endamálið við hesum tiltaki er at útvega pening til vælgerandi endamál.

Lions segði undan tiltakinum, at árligi jólahugnin er hjá mongum startskotið til jólastákanina, ið setur sín dám á adventina, og aftur í ár er talan um eitt hálvantriðja tíma langt tiltak, ið plagar at verða væl vitjað. Og so var, tí nógv fólk høvdu leitað sær í Viðarlundina í góðveðrinum í gjár.

Endamálið við tiltakinum er at útvega pening til vælgerandi endamál

Tiltakið hevur verið fastur táttur síðstu gott og væl 20 árini, og hvørja ferð hevur Lions Club Tórshavn í góðum samstarvi við Skógrøkt Landsins fingið skapt góðan jólahugna í Viðarlundini – eisini henda seinnapartin, so øll fingu best hugsandi byrjanina upp á adventina og komandi jólatíðina, samstundis sum tey stuðla vælgerandi arbeiði.

Rætting til:

## Mína uppskrift í Vikuskiftis Sosialinum

Ein villa var komin í uppskriftina, sum stóð at lesa í Vikuskiftis Sosialinum fríggjadagin. Tað var hvíti, sum skuldi í dressingin og ikki eggjahvíti. Rætta uppskriftin uppá dressingin sær soleiðis út:

**Spinat pannukøkur við laksi**
**Dressingur:**
8 tsk. rabarbuchutney
8 spsk. Hvíti (ymer)
Blanda hetta saman til ein dressing.